# Heilsumálaráðið

Dagfesting: 15. juni 2022
Mál nr.: 22/11443
Málsviðgjørt: AS
Ummælistíð: Skrivið frá/til
Eftirkannað: Lógartænastan dagfestir

**Uppskot til**

## Kunngerð um broyting í kunngerð um sjúklingaráð

(Ásetingar um limatal í sjúklingaráðnum, umframt uppgávur og skyldur)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 83 frá 17. august 2006 um sjúklingaráð, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 2 verður orðað soleiðis:
”**§ 2.** Uppgávurnar hjá sjúklingaráðnum fevna um:
1) At ráðgeva landsstýrismanninum í sambandi við uppskot til lógir og kunngerðir, um uppskotini hava týdning fyri veitingar til sjúklingar, og
2) At viðgera mál av generellum og prinsipiellum týdningi fyri veitingar til sjúklingar.
*Stk. 2.* Sjúklingaráðið kann ikki viðgera ítøkilig persónsmál.”

**2.** Í § 3, stk. 1 og í § 4 verður áðrenn “mál” sett: ”uppskot til lógir, kunngerðir og onnur”.

**3.** § 5, stk. 1, verður orðað soleiðis:
“**§ 5.** Landsstýrismaðurin velur fimm limir í sjúklingaráðið millum annað eftir uppskoti frá feløgum og áhugabólkum, sum umboða sjúklingar, ið vanliga verða viðgjørdir á sjúkrahúsunum. Feløgini og áhugabólkarnir kunnu í mesta lagi hvør sær skjóta upp fimm umboð.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin velur limirnar soleiðis, at samansetingin av ráðnum verður so breið sum gjørligt. Miðað skal verða ímóti, at umboðini í ráðnum eru frá báðum kynum, sbr. § 8 í Løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn, og frá ymsum landafrøðiligum økjum í Føroyum.”

**4.** § 6, stk. 3 og stk. 4 verða orðað soleiðis:
“*Stk. 3.* Sjúklingaráðið velur formann og skrivara millum limirnar.
*Stk. 4.* Sjúklingaráðið skal í minsta lagi hava 2 árligar fundir við landsstýrismannin.”.

**5.** Í § 6 verður sum stk. 5 sett:

“*Stk. 5.* Sjúklingaráðið letur í seinasta lagi 1. apríl landsstýrismanninum ársfrágreiðing um sítt arbeiðið.”.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Heilsumálaráðið, dagfesting

**Kaj Leo Holm Johannesen**
landsstýrismaður

/ Turid Arge

**Skjal 1**

## Heitið á skjalinum